## Ætla risastórt reiðarí

Samráðingar eru í hesum døgum millum donsku reiðaríini A.P. Møller - Mærsk, DFDS og Clipper um at stovna eitt risastórt norðurevropeiskt reiðarí, og sambært Børsen eru útlendsk reiðarí møguliga við í samráðingunum. A.P.Møller - Mærsk váttaði í síðstu viku, at felagið arbeiddi við at selja niðurlendska reiðaríið Norfolkline, og um somu tíð boðaði DFDS bfrá, at felagið hevði áhuga í at keypa sama reiðarí, og at Clipper og onnur reiðarí høvdu fingið fyrispurning um sama felag. Keldur hjá Børsen siga, at umframt A.P.Møller - Mærsk, DFDS, Clipper og Norfolklin er tað sannlíkt, at Scandlines kemur uppí eins og tað svenska Stena Line, belgiska Cobelfret og tað italska Grimaldi Lines.



## Ókeypis húsalán

Í Noregi er rentan á húsalánum við at koma so langt niður, at verða prísvøkstur og rentufrádráttur tikin við, er tað so at siga ókeypis at læna pengar. Tað sigur Harald Magnus Andreassen, leiðandi búskaparfrøðingur hjá First Securities, við blaðið VG. Hann roknar við, at í heyst verður rentan so lág, at við frádrátti og prísvøkstri verður rentan í veruleikanum 0. Búskaparfrøðingar í Nordea og Fokus Bank, sum VG hevur tosað við, aiga tað sama. Terir siga, at rentan á húsalánum kann koma niður á 2,5 prosent, og við 28 prosentum í rentufrádrátti og einum prosenti í prísvøkstri verður realrentan millum 1 og 0 prosent.

# Høgni satsar alt

**Høgni Lisberg er farin í holt við umfatandi útbreiðsluarbeiðið við síni nýggjastu fløgu, Haré! Haré!, ið kom á marknaðin fyri jól. Nú er tíðin komin, til hann skal sláa í gjøgnum á altjóða tónleikapallinum, nú er liðugt við vánaligum avtalum. Í staðin skal gull spinnast úr harða arbeiðnum**



*Høgni Lisberg satsar alt í arbeiðnum at skapa sær eitt navn. Hann hevur millum annað gongd í spennandi útbreiðsluarbeiði í Noregi og USA*

TÓNLEIKUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

- Nú er liðugt við at gera vánaligar avtalur, sigur Høgni Lisberg yvir ein kaffimunn, júst afturkomin frá venjing.

Hann hevur um vikuskiftið tvær konsertir á skránni, tann fyrsta verður á Stuðulskonsertini í kvøld, og tann seinna verður á uttandurakonsertini hjá Umhvørvisvikuni, sum verður leygarkvøldið. Á konsertunum fer hann at spæla saman við Jens L. Thomsen og Brandi Jacobsen, ein trio, sum í ár hevur verið á ferð í Frankaríki, Danmark, Íslandi og Føroyum.

- Tónleikurin riggar væl til eina trio. Harafturat er tað eitt passaligt setup at fara avstað við. Er setuppið ov stórt, er lítið í part, og stórt sæð eingin kjansur fyri vinningi, sigur Høgni Lisberg.

Hann hevur nevniliga ætlanir um at Haré! Haré! skal vera fløgan, sum fer at slóða vegin fyri hann, og skapa honum eitt altjóða tónleikanavn. Tað skal millum annað gerast við at skapa røttu sambondini, og vera sjónligur í røttu

- Eg havi ikki ráð at investera meira. Nú skal eg helst fáa pengar burturúr arbeiðnum, sigur hann.

### Haré! Haré perfekti cocktailurin

Haré! Haré!, sum kom út tíðliga í desember, brýtur nógv frá undanfarnu fløgum hansara, ið høvdu lagt seg á singer/songwriter bógvin. Hann avgjørdi at hálsa um, og sameindi á fløguni sínar bakgrundir sum trummuleikari og gittarleikari, sum vísti seg at vera ein væl smakkandi cocktail. Fyrsta upplagið er longu selt, og í Noreg er áhugin stórur fyri at geva fløguna út.

- Tað er eitt plátufelag í Noreg, sum eitur Nordic Records, ið hevur spennandi ætlanir við míni fløgu. Eg sendi mína fløgu til gjøgnumlurtingar, og tað vísir seg at tey elska hana, og vilja senda hana á norska marknaðin. Tað er ein nýggjur marknaður fyri meg, og minst líka spennandi sum nakar annar.

Vísandi til fyrstu útsøgn í greinini, brendi Høgni seg av eini avtalu, hann gjørdi við eitt belgiskt felag. Hann gjørdi ein sáttmála við eitt felag, sum hann einki fekk burturúr. Nú er liðugt við tí.

- Eg vil heldur gera alt promo arbeiðið sjálvur, enn gera vánaligar avtalur. Fyri meg ræður tað um at skapa eina lurtarafjøld á røttu plássum.

Og higartil hevur tað víst seg at vera ein góð avgerð hjá honum. Umvegis Sonicbids fekk Høgni hálað eina øðrvísi avtalu í land, sum kann gera stórt arbeiði fyri hann í USA.

- Har var ein fyrispurningur sendur út, har tey bóðu tónleikarar um at koma at hita upp fyri Kings of Leon. Eg bjóðaði meg fram, men fekk ikki møguleikan at hita upp fyri Kings of Leon. Í staðin bjóðaðu tey mær at vera við í kampanju hjá Platform One. Umvegis Platform One vann eg atkvøðugreiðsluna um at framføra á SXSW í Austin, Texas. Tíverri gjørdist tíðin ov knøpp til visum og ymiskt annað praktiskt í samband við túrin, so eg mátti melda avboð.

### Tol skal til

Kampanjan hjá Platform One koyrir framvegis. Platform One, ið er eitt felag við drúgvum royndum, umboðar einar 16 tónleikarar í hesi kampanjuni, við eitt nú at skipa fyri lurtaraveitslum í amerikanska collegeumhvørvinum. Samstundis bíðar Høgni í tolni eftir hvat fer at henda við norska plátufelagnum. Kortini ásannar Høgni, at gjøgnumbrotið ikki kemur av sær sjálvum, og at tað ikki hendir yvir eina nátt. Tónleikaframleiðarar, ið ynskja at vinna seg fram í dag, kunnu hava tað trupult, hava teir ikki eitthvørt serstakt at vísa á. Tað snýr seg í stóran mun um at fara miðvíst til verka, trúgva uppá sína vøru og alla tíðina at halda fokus.

- Marknaðurin broytist alla tíðina, og er ikki til at kenna aftur bara fyri nøkrum árum síðan. Bara síðan mín fyrsta fløga kom út í 2003, er nógv hent. Síðan tá eru fólk givin við at keypa fløgur, og verður tónleikurin í staðin tikin niður av netinum. Tí eri eg ótrúliga spentur uppá hetta norska felagið, sum hevur klárað so væl at tilpassa seg marknaðin gjøgnum árini, sigur Høgni Lisberg.

Fram til tá setir hann alt inn í arbeiðnum at menna sítt sum tónleikanavn. Ein møguleika fær hann til tað fríggjakvøldið 22. Mai, tá hann hevur fingið eitt gott pláss á SPOT festivalinum í Århus. Tað verður á midnátt á Archaus pallinum.

- Ringar avtalur fara at koma aftur, tíverri. Tað er naivt at halda annað. Men eg haldi, at man við tíðini blívur betri til at velja tey røttu fólkini at samstarva við. So eg geri hvat eg kann fyri at velja tær røttu avtalurnar. Og finst ein slík ikki í einum øki, ja, so geri eg kanska arbeiði sjálvur í staðin.